# Skiftisgrunnur er haft um beinið á búskapargrunni

**Ætlanin um at Búskapargrunnur Føroya partvís skal brúkast til at fíggja føroyskt sjálvstýri við er eitt haft um beinið á grunninum. Ætlanin hóttir nú við at forkoma búskapargrunninum, ið upprunaliga varð ætlaður at fyrireika føroyska búskapin til avkastið frá oljuvinnuni**

BÚSKAPARGRUNNUR
*Rúnar Reistrup*



Løgmaður vil ikki leggja uppskotið um Búskapargrunn Føroya fyri tingið, fyrr enn ein breið semja um uppskotið er fingin í lag í løgtinginum. Men teir stóru andstøðuflokkarnir vilja ikki vita av einum búskapargrunni, sum eisini skal virka sum skiftisgrunnur at fíggja førosykt sjálvstýri við. Teir taka hinvegin fult undir við at skipa ein búskapargrunn til væntandi komandi oljuinntøkurnar, og tí er tað eitt haft um beinið á uppskotinum um Búskapargrunn Føroya, at grunnurin eisini skal nýtast sum skiftisgrunnur.

Løgmaður ætlar í næstum at taka andstøðuna við upp á ráð, soleiðis at allir flokkar kunnu koma ásamt um eina skipan, men longu nú eru samgonguflokkarnir rættiliga ósamdir innahýsis um, hvussu uppskotið um Búskapargrunn Føroya skal síggja út.

### Skal grundfestast væl

Fyri løgmann hevur ein breið semja í løgtinginum um búskapargrunnin meira at týða, enn at uppskotið kemur skjótt á tingborð, soleiðis sum Tjóðveldisflokkurin ætlar tað.

– Við búskapargrunninum skulu vit leggja tilfeingið hjá øllum føroyingum í allari framtíð til rættis. Tí er tað ógvuliga týdningarmikið at skipanin er væl og virðiliga grundfest, bæði í politisku skipanini og í fólkinum. Búskapargrunnurin er ikki ein skipan, sum kann broytast frá einum degi til annan, og tí er tað umráðandi at tað verður gjørt rætt nú fyrstu ferð, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

### Samtykkjast tvær ferðir

Løgmaður kundi hugsað sær at skipanin við búskapargrunninum verður samtykt soleiðis, at hon ikki kann broytast av einum einsamøllum løgtingi, men at allar broytingar í skipanini skulu samtykkjast tvær ferðir í løgtinginum við vali ímillum. Men hetta krevur at uppskotið um búskapargrunnin fyrst verður samtykt av tveimum ymsikum løgtingum.

Hvørjir flokkar fara at sita í samgongu komandi valskeið er ilt at vita, og tí er neyðugt við einari breiðari semju í løgtinginum um búskapargrunnin, um vissa skal vera fyri at uppskotið eisini verður samtykt av komandi løgtingi.

### Vilja ikki síggja skiftisgrunn

Men sum er røkist lítið fyri hesi semju, tí hvørgin av teimum báðum størstu andstøðuflokkunum, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, kunnu taka undir við búskapargrunninum, um hann eisini skal brúkast sum skiftisgrunnur at fíggja føroyskt sjálvstýri við.

– Vit eru positivir fyri at tað verður settur ein grunnur á stovn, soleiðis at tær inntøkur, sum vit fáa frá oljuvinnuni, kunnu kanaliserast inn í grunnin og so býtast út aftur á skynsaman hátt, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

– Men fyribilsuppskotið um Búskapargrunn Føroya, sum tað sær út nú, er eisini skiftisgrunnur at fíggja sjálvstýri við, og tað kunnu vit ikki taka undir við, sigur formaður Javnaðarfloksins.

– Tað, sum verður lagt upp til í fyribilsuppskotinum til Búskapargrunn Føroya, um at heildarveitingin úr Danmark skal í grunnin, kunnu vit als ikki taka undir við. Ein búskapargrunnur í sær sjálvum er ikki nakar vánaligur máti at bøta um føroyska búskapin, men hetta sum samgongan nú arbeiðir við er eitt býtisbarn, sum hevur skift navn fleiri ferðir og sum vit als ikki kunnu taka undir við, sigur Lisbeth L. Petersen, formaður Sambandsfloksins.

### Løgmaður klárur at slaka

Støðan hjá andstøðuni kemur ikki óvart á løgmann, og hann er eisini fyrireikaður uppá at slaka fyri at fáa so breiða semju sum møguligt fyri uppskotinum um búskapargrunnin.

– Tað er klárt at tess meira verður gjørt til part av búskapargrunninum, størri er vandin fyri at vit ikki fáa breiðan meiriluta. Eg skilji í grundini væl, at andstøðuflokkarnir ikki taka undir við, at partur av búskapargrunninum skal brúkast sum skiftisgrunnur, og tí krevur hetta at fáa eina gjølliga politiska viðgerð, sigur løgmaður, sum í næstum fer at kalla andstøðuflokkarnar til kjak um búskapargrunnin.

Uppá spurningin um Fólkaflokkurin er til reiðar at taka skiftisgrunnin úr uppskotinum um Búskapargrunn Føroya, vil Anfinn Kallsberg ikki geva nakað beinleiðis svar, men sigur.

– Eg eri øgiliga áhugaður í at fáa ein búskapargrunn upp at standa, sum er væl og virðiliga kjølfestur. Tað er soleiðis, at tá tú skalt hava eina breiða semju, so er neyðugt at fara inn í kjakið við opnum sinni.

### Samgongan ósamd

Seinastu dagarnar er komið fram, at samgonguflokkarnir eru rættiliga ósamdir um, hvat uppskotið um Búskapargrunn Føroya skal innihalda. Tjóðveldisflokkurin vil leggja uppskot um sjálvan grunnin fram fyrst, og fastseta reglurnar fyri útgjald úr grunninum seinni. Fólkaflokkurin vil hinvegin ikki seta nakran búskapargrunn á stovn, fyrr enn reglurnar um útgjald úr grunninum eru komnar upp á pláss.

Javnaðarflokkurin tekur undir við Fólkaflokkinum í hesum seinasta.

– Fyri mær at síggja er tað umráðandi at vit fáa reglurnar um útgjald úr búskapargrunninum upp á pláss nú beinanvegin, meðan vit enn kunnu hugsa klárt. Tá ið oljumilliardirnar byrja at renna, verður eitt øgiligt trýst á allastaðni frá, og ynskini vera alinlong. Tá verður ringt at seta reglur upp fyri hvussu pengarnir skulu brúkast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen, heldur ikki, at búskapargrunnurin hevur so øgiligan skund beint nú.

– Lat okkum nú fyrst síggja um tað vera nakrar oljuinntøkur at koyra í handan grunnin. Um tað vísir seg at vera, so kunnu vit taka støðu til hvussu tær skulu gjaldast út aftur, sigur Lisbeth L. Petersen.

Tað er soleiðis ikki geitt, um uppskotið um Búskapargrunn Føroya yvirhøvur fer at koma fyri tingið í hesi tingsetu, sum er tann seinasta í verandi valskeiði.

# Anadarko ger framkomnar seismiskar kanningar

SEISMIKKUR
*Jan Müller*

Um somu tíð sum tvey av oljusamtøkunum, ið hava leitiloyvi á landgrunninum, eru farin undir at bora, brúka onnur oljufeløg orku og pengar uppá at gera nýggjar seismiskar kanningar av undirgrundini. Eitt av hesum feløgum er amerikanska Anadarko. Felagið fekk í 1. útbjóðingarumfarinum tillutað eitt sokallað 9 ára loyvi. Tvs. at felagið skal ikki bora nakran brunn fyrstu árini men skal harafturímóti gera seismiskar kanningar. Eftir trimum árum skal felagið so gera av, um tað hevur fingið so mikið av nýggjum upplýsingum, at tað vil fara undir at bora.

Johan Mortensen, stjóri hjá Andadarko í Føroyum sigur, at teir í løtuni skjóta eitt seismiskt survey á loyvinum 007. Hetta er sera framkomin og nýggjur seismikkháttur sum er liður i at síggja, hvat er undir basaltinum, sum jú er tjúkkari nærri tú kemur Føroyum.

Felagið VERITAS stendur fyri seismikkinum. Hesar royndir saman við øðrum arbeiði, sum fer fram á skrivstovunum hjá Anadarko í London og Houston, eru liður í fyrireikingum hjá Anadarko at taka støðu til, um og nær likindi eru at fara undir at bora.

Anadarko, eins og øll onnur, fylgja boringunum hja STATOIL, BP og AMH við allar størsta ahuga sigur Johan Mortensen.

-Verður olja funnin í ár verður hetta ein sensatión, sum allarhelst fer at framskunda allar ætlanir á føroyska økinum og tá hava feløg møgulleika at tosa um eitt føroyskt geologisk modell at nýta á føroyaøkinum. Hetta hevur man sum vera man ikki havt áðrenn borað verður sigur Johan Mortensen.